## DAGSINS MEINING

# Vinstrasnaring

Floksting Tjóðveldisflokksins var sera áhugavert á mangan hátt. Meðan Tjóðveldisflokkurin var í fullveldissamgonguni snaraði hann til høgru. Flokkurin gekk inn fyri frælsum marknaðarbúskapi og torført kundu mangan vera at síggja munin millum Tjóðveldi og Fólkaflokk. Men nú er so vent í holuni. Yvirlýsingin frá flokstinginum, sum var hildið seinasta vikuskiftið er í tveimum. Tann eini parturin er ein meting av samgongunir – hin er ein útgreining av flokksins politikki í framtíðini.

Staðfest verður, at samgongan hevur økt um stættamunin millum fólk og ækt um munin millum tey ymsu økini í Føroyum. Tala verður um væntandi rættartrygd, sosialpolitikk og funnist verður at hesum, at einki verður gjørt fyri at minka um stættamunin í Føroyum. Meðan samgongan soleiðis fær toyggið hevur Tjóðveldisflokkurin bert rós til vinnulív og mentan, ið megna at skapa virðisøking, hóast trongar larmar. Eisini sjálvstýrispolitikkurin hjá samgonguni fær harðan dóm.

Yvirlýsingin er ein heilt greið snaring til vinstru. Snaringin er so mikið st´ro, at vit skulu heilt aftur til flokksins barndóm fyri at finna nakað sum líkist. Í byrjanini var Tjóðveldisflokkurin so vinstravendur, at tær borgarligu Føroyar ræddust hann sum hin versta. Retorikkurin var heldur ikki til at mistaka seg av. Har varð tala um stættastríð og um at fiskimenn og verkafólk skuldu einsamøll eiga vinnutólini, har varð dundrað móti imperialsimu og fascismu. Flokkurin var eisini virkin innan samvinnufeløg fiskimanna og sum heild ein vinstrahallur flokkur. Men so við og við broyttist henda kós og varð hon mestum heilt slept undir tí sokallaða sjálvstýrisslandstýrinum. Men nú er so vend komin í og vøtnini skiljast í føroyskum politikki. Javnaðarflokkurin hevur lýst stættatsríðið av at vera – Tjóðveldisflokkurin hevur sent teimum ráðandi stættunum krígsavbjóðing. Nú verður spennandi at síggja, hvussu leikur fer og hvønn dóm veljarin fer at fella. Eitt er vist: einki demokratiskt samfelag kann vera fyri uttan minst ein vinstarflokk.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fuglafjarðar kommuna

KJARTAN MADSEN

Á sumri 2003 vóru vit nøkur fólk á Kambsdali sum skrivliga mótmæltu eini ætlan at gera eitt ítróttarvøll 5-10 metrar frá húsum okkara. Vit vístu í skrivi á, at kommunan ikki hevði rætt at gera slíkan vøll á økinum, tí tað var í móti byggisamtyktini. Hóast Tekniska nevnd við Dánjali Vang, Jón N. Olsen og Jan Toftegaard, greiðliga fekk at vita frá Innlendismálaráðunum (9. mars 2005), at teir ikki mugu seta nakra útgerð upp, lata teir sum luft og halda fram við arbeiðnum. Hóast eg fleiri ferðir hava skriva til Teknisku nevnd og eisini til allar kommunustýrislimirnar – Sigurd Simonsen, Dánjal Vang, Petur Abrahamsen, Jón N. Olsen, Tórfríð Abrahamsen, Jan Toftegaard, Eyðun á Lakjuni, Signar á Brúnni og Elisabeth Olsen –, og víst teimum á, at teir gera ímóti byggisamtyktini, lata teir ikki um vón. Ikki ein einasti teirra svaraði aftur. Vit sum búgva í kommununi vita, at her fara so nógv løgin mál fram (onkur kallar tað rossahandlar), har kommunustýrislimirnir geva hvørjum øðrum serrættindi, at eingin teirra kann/vil mótmæla uppskoti, ið onkur teirra setur fram. ”Eg eitt parkeringspláss framman fyri húsini (og einki hús) og tú ein veg”. Soleiðis arbeiða okkara kæru fólkavaldu, annars mátti, um ikki annað, ein teirra støðga lógarbrótingini. Er tað nakað at siga til, at hinar bygdirnar í grannalagnum ikki vilja tosa um samanlegging við Fuglafjarðar kommunu.

At vit enn mótmæla, kemur ikki av, at vit ikki ynskja ítróttarvøll. Nei, als ikki, men einans ikki so tætt við húsini. Dalurin er stórur, har eru fleiri 1000 ferðmetrar á byggja á, m.a. við ítróttarhøllina. Tað økið er lagt av til endamálið.

Innlendismálaráðið veit sera væl av, at kommunan ikki fylgir niðurstøðuni, men tey ikki stundir at gera nakað við málið, tí arbeiðsbyrðan er ov stór.

Ætlaði ikki at skriva lesarabrævið, men metti hetta var einasti máti at varpa ljós á málið.

# Sambandsflokkurin 100 ár ella?

JAN HALDANSEN
Formaður S. Sambandsfelag



Nú eru nakrir dagar farnir síðani formannsvali var, eg persónliga vil hervið leggja lok á málið.

Tað standa tó nakrir spurningar ósvaraðir og sum nok heldur aldrin verða svaraðir. Eina umbering skal eg tó bera Jaspuri Vang, hann veit nokk sjálvur hvat hon inniber. Man eigur aldrin at verða so sjálv glaður, at man ikki kann biðja um umbering.

Tað hevur verði nógv sagt og skriva, um undirskriftir sum Suðuroyar Sambandsfelag skal hava haft umhendi, tað er satt, men eftir eg havi skriva hesu grein verða tær burturbeindar, so tey sum stulaðu, ikki skullu verða hongd út fyri hetta seinni.

Sambandsflokkurin fyllir 100 ár í ár, men hvat fyri leiklut flokkurin kemur at hava í framtíðini, dugi eg ikki at siga. Tað einasta eg veit er, at eitt stórt arbeiði skal gerðast fyri at bøta um skaðan sum er gjørdur tey seinastu 2 árini.

Mínir dagar eru nokk taldir sum formaður í Suðuryoar Sambandsfelag, tó skal tað viðmerkjast, at áheitanir eru komnar um at halda áframm. Fólk halda tað verða gott við fólki sum hava eina meining. Vit fáa at síggja hvat hendir, tað eru mangir leikir í longum talvi.

Formaðurin í Suðuroyar Sambandsfelag skal ikki liggja í buktini fyri meningini av sambandsflokkinum í suðuroynni. Tað eru nokk nógv fólk sum vóna at eg leggji frá mær, bæði norðanfjørs og í suðuroynni, men er tað rætt av mær at leggja áranar inn so tíðliga. Skullu tit/eg gloyma og halda áfram við sambandshjarta. Hetta er ein spurningur sum eg fari at umhugsa.

Eg vóni at vit tóku feil viðvíkandi Kaj Leo Johannesen. Er tað so, at Kaj Leo er maðurin sum skal bera flokkin fram, so ynski eg hon góða ednu og veiti stuðul.

Er Suðuroyggin nøgd við tað sum er fari av valskeiðinum, hava vit fingið nóg stóran bita av køkuni, ella skullu vit bara gleðast um tað sum hendur norðanfjørs. Ella skulu vit gleðast um politikkurin sum eina heild.

Eitt skal tó sigast aftrat og tað er, um eg haldi fram so skal okkurt meira nágreiniligt henda.Her eru fólk í oynni og kring landi sum royna ymiskar møguleikar, men tað steðgar upp, tá umsóknirnar fara inn um almennan durakarm.

Eitt sum sambandsflokkurin eigur at gera ella má gera, er at koma við eini umbering til uttanflokka tingmannin. Tað kann ikki verða rætt, bara lata sum um einki er hent viðvíkandi landstýrisessinum hjá honum. Tí, skulu vit øll klandrast víðari, so verður tað bara onkur annar sum stendur sum svarti Per næstuferð.

# Til Føroya Løgting

JENS MORTAN MORTENSEN
formaður í Urguleikarafelagnum

Á aðalfundi í Urguleikarafelagnum hin 25. mars 2006 var samtykt at heita á Føroya Løgting um at atkvøða fyri uppskoti Tjóðveldisfloksins um størri játtan til Føroya Musikkskúla, soleiðis at musikkskúlin eisini kann fáa ráð til at seta ein urgulærara í starv. Hesin kann síðan menna tey, sum í dag spæla í kirkjum og samkomum, samstundis sum at ungt fólk verður lært upp. Havandi í huga, at tað tekur nógv ár at útbúgva ein urguleikara og er kostnaðarmikið fyri tann lesandi, má ikki drálast við hesum.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.